# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour nr: 09-097_6
15-03-2011

**Annika Olsen lsm.**
**Innlendismálaráðið**

***Viðv.: Uppskoti til semju um fígging av eldrarøktini*** *(tygara 10/00017-9, frá 25. februar)*

Á stýrisfundi 8. mars viðgjørdi stýrið í Føroya Kommunufelags uppskot tygara til semju um fígging av eldrarøktini í sambandi við, at økið skal leggjast út til kommunurnar 1. januar 2013.

## Uppskotið

Fortreytirnar fyri uppskotinum eru, at kommunurnar eru skipaðar í 9 kommunalar eindir, og at eldralóg er gjørd.
Eldrarøktin skal fíggjast við afturbering, blokkstuðli og ávísari serskipan fyri Sandoy.

## Felagsins viðmerkingar til uppskotið

Føroya Kommunufelag tekur undir við, at kommunurnar fáa kommunuskatt av frádráttunum, sum eru nevndir á síðu 4 í uppskotinum (ovara talvan). Vit vísa tó á, at hesir frádráttir ikki eru javnt býttir millum nýggju kommunueindirnar, t.d. er fiskimanna-frádrátturin væl hægri fyri hvønn íbúgva í Sandoynni enn í t.d. "Vesturkommunu". Hetta ger, at kommunur við nógvum frádrátturm gerst lutfalsliga betur fyri enn tær við fáum frádráttum. Vit halda, at rættast hevði verið at tikið aðrar skeivleikar millum kommunur við; felagið hevur fyrr víst á, at m.a. inntøkurnar av partafelagsskatti og havnargjøldum eru ógvuliga ójavnar, og tí hava vit skotið upp at útjavna partar av hesum inntøkum. Harumframt ivast kommunur í, um skattaskylduga inntøkan í talvuni á síðu 2 er røtt. Føroya Kommunufelag heldur, at øll ógreiða um inntøkugrundarlag má fáast burtur, áðrenn vit kunnu taka ítøkiliga støðu til uppskotið.

Vit ivast í, um tað er rætt at nýta talið av eldri sum grundarlag undir býti av blokkstuðli til kommunurnar. Í fyrsta lagi er ymiskt, hvussu stór fíggjarlig byrða ein eldri er, í ávísum økjum í landinum hava væl fleiri eldri egna pensjónsuppsparing, og tey gjalda tí kommunuskatt. Vit halda heldur ikki, at talið av eldri samsvarar við útreiðslur til eldra-røkt. Nakrar kommunur hava bygt røktarheim, sambýli, hava dagtilhald, mattænastur, koyritænastur o.a., meðan aðrar kommunur hava fá ella ongi tilboð til eldri. Vit sakna uppskot um, hvussu kommunur, sum hava stórar eldraútreiðslur, ikki koma at vera verri fyri enn nú. Havast má millum annað í huga, at tær kommunur, sum hava bygt røktar-heim, hava bygt tey út frá tí fortreyt, at kommunan byggir og landið rekur.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Sambært uppskotinum er landsins partur av eldrarøktini í dag (2010) mett til 340 mió. kr, hesa upphædd er ætlanin, at kommunurnar skulu fáa fyri at reka eldrarøktina. Vit halda als ikki, at henda upphædd er nøktandi. Vit vita, at um 150 nýggj røktarheimspláss verða bygd, kostnaðurin at reka hesi er um 75 mió. kr. Føroya Kommunufelag krevur, at kommunurnar fáa fulla kompensatión fyri veruliga kostnaðin av eldrarøktini í framtíðini – eisini fyri lønarhækkingar. Vit vilja eisini hava trygd fyri, at ásetingar í ætlaðu eldralógini ikki fara at geva kommununum óvæntaðar meirútreiðslur.

Serskipan verður gjørd fyri Sandoynna, tí fólkatalið er lægri enn í hinum økjunum. Verður hendan serskipan goldin av samlaðu upphæddini (340 mió. kr), ella er talan um beinleiðis landsstuðul? Inntøkugrundalagið á Sandoynni verður broytt, sum um 2.000 búðu í oynni. Hví er hetta bert galdandi fyri Sandoynna, tá annað økið eisini er niðanfyri 2.000 íbúgvar?

Føroya Kommunufelag heldur ikki, at nøkur orsøk er at taka endaliga støðu til uppskotið, fyrr enn fortreytirnar fyri tí eru fingnar til vega. Vit halda ikki, at ivamál nevnd omanfyri og ítøkiligar útgreiningar skulu gerast, fyrr enn semja er um kommunala bygnaðin – t.v.s. at kommunurnar eru lagdar saman.

Vegna stýrið

Asbjørn Djurhuus, form. FKF

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo